Almannamálaráðið

Dagfesting: 29. september 2020
Mál nr.: 20/00799
Málsviðgjørt: BÁT

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 19. Viðbótin til fólkapensjón verður lækkað við 20% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20. Stk. 2. Grundupphæddin til fólkapensjón verður lækkað við 20% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20 hjá persóni, ið er føddur aftaná 31. desember 1952. Lækking av viðbót verður gjørd í framhaldi av lækkingini av grundupphæddini við 25%. Stk. 3. Fyri pensjónist, ið er føddur áðrenn 1. januar 1953, verður viðbótin til giftan fólkapensjónist, tá bæði fáa fólkapensjón, lækkað við grundarlagi í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum tilsamans. Stk. 4. Er annar hjúnafelagin fevndur av § 19, stk. 2, verða inntøkurnar ikki lagdar saman. Stk. 5. Hjún, ið bæði eru fevnd av stk. 3, kunnu søkja um at inntøkurnar ikki verða	Aftaná § 19 verður sett:

lagdar saman og at lækkað einans verður í viðbótini við grundarlagi í egnari inntøku. Stk. 6. Viðbótin til fyritíðarpensjón sbrt. § 2, stk. 2 verður lækkað við 30 % av inntøkugrundarlagi pensjónistsins sbrt. § 20. Skiftisupphæddin til fyritíðarpensjónistar sbrt. § 7, stk. 2 í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum verður lækkað á sama hátt í framhaldi av viðbótini. Stk. 7. Eykaviðbótin til fyritíðarpensjón sambært § 2, stk. 4 verður lækkað eftir somu reglum, sum viðbótin sbrt. stk. 6. Lækkingin av viðbótini til lægstu fyritíðarpensjón verður gjørd í framhaldi av lækkingini av eykaviðbótini. Stk. 8. Grundupphæddin til fyritíðarpensjón sambært § 2, stk. 2 verður lækkað í framhaldi av og eftir somu reglum, sum lækkingin av viðbótini og eykaviðbótini sbrt. stk. 6 og 7. Stk. 9. Pensjónin dettur burtur, tá hon er minni enn 1/40 av grundupphæddini.	
	§ 19a Hjá persóni, sum móttekur fyritíðarpensjón, og samstundis móttekur lestrarstuðul sambært lógini um lestrarstuðul § 6, stk. 2, nr. 1, nr. 3, nr. 6, nr. 7 og nr. 9, verður lestrarstuðulin drigin frá grundupphæddini. *Stk. 2.* Er lestrarstuðulin hægri enn grundupphæddin, verður upphæddin, sum er hægri enn grundupphæddin drigin frá í avlamisviðbótini. Fyri lægstu fyritíðarpensjonistar verður drigið frá í eyka viðbótini